**Semja millum**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**
**og**
**Fíggjarmálaráðið**

Viðvíkjandi sáttmálanum millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Fíggjarmálaráðið fyri skiparar og stýrimenn á fiskirannsóknarskipinum Magnus Heinason.

1. Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið 1.10.2015 til 1.10.2017.

2. Lønarhækkingar
- Tann 1. oktober 2015 hækkar lønin 1,125%.
- Tann 1.oktober 2015 hækkar eftirlønin úr 7% upp í 8,41%.
- Tann 1. oktober 2016 hækkar lønin 0,95%.
- Tann 1. oktober 2016 hækkar eftirlønin úr 8,41 % uppí 9,60%

3. Broyting í sáttmálatekstinum.
§ 6. eftirløn verður soljóðandi:
"Frá 1. oktober 2015 er eftirløningjaldið 8,41 % av skalalønini, men ikki av serstøkum gjøldum ella úrtíðargjøldum.
Frá 1. oktober 2016 er eftirlønargjaldið 9,60 % av skalalønini, men ikki av serstøkum gjøldum ella úrtíðargjøldum.
*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin rindar alt eftirlønargjaldið í góðkenda eftirlønarskipan."

4. Partarnir eru samdir um, at kemur nýtt ella annað skip inn fyri Magnus Heinason í sáttmálaskeiðnum, taka partarnir upp nýggjar samráðingar. Partarnir kunnu tó ikki seta stríðsstig í verk í nevnda sáttmálaskeiðnum.

*Á Argjum 2. mai 2016*

Føroya Skipara- og Navigatørfelag | Fíggjarmálaráðið